Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



Hotel Vágar:

# Tríggjar høvdu 25 ára starvsdag

**Fríggjadagin 19. mars var móttøka á Hotel Vágum, í samband við at hotellið varð 25 ár og Flogfelag Føroya 40 ár. Hendan dagin blivu trý av starvsfólkunum, sum høvdu arbeitt á hotellinum í 25 ár, heiðraði**

Hotel Vágar bleiv alment tikið í brúk 8. mars 1979, men um ársskiftið 1978/79 vórðu tær tríggjar: Joan Jørgensen í Sørvági, Ann-Mari Hattarstein í Miðvági og Malja Danielsen í Sørvági, settur á starv á hotellinum. Joan og Malja hava arbeitt í køkinum, meðan Ann-Mari hevur verið í móttøkuni og serverað á matstovuni.

Í fjør fóru Joan og Malja í læru sum kokkar, og verða tær lidnar við hesa útbúgving í juni mánað.



*Hesar tríggjar blivu heiðraðar á móttøkuni á Hotel Vágum seinasta fríggjadag, f.v. Joan Jørgensen, Ann-Mari Hattarstein og Malja Danielsen*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Almennur fyrilestur á Fróðskaparsetrinum



FYRILESTUR
*Tíðindaskriv*

Fjórði fyrilesturin í røðini 'Modernaðir teoretikarar' sum Fróðskaparsetur Føroya og Føroya Fróðskaparfelag skipa fyri í vár, verður mikukvøldið 24. mars kl. 20.00 í Ovastovu í Nóatúni.

Firouz Gaini, antropologur og Ph.D-lesandi (á myndini) fer at halda fyrilesturin "Ernest Gellner. Størsti forsprákarin fyri rationalismuni í nýggjari tíð."

Fyrilesturin verður ein lýsing av tí umstrídda og flogvituga antropologinum, ið óvikaliga tvíhelt um rationalismuna og universialismuna, sum vit vanliga seta í samband við upplýsingartíðina. Ernest Gellner (1925-1995), ið var av kekkisk-jødiskum uppruna, var professari á London School of Economics (LSE) í nógv ár. Umframt antropologi hevði Gellner lisið søgu og heimspeki, og bøkur hansara fevna um so ymisk evni sum nationalismu, islam, vísindaástøði, rationalismu, Eysturevropa, o.s.fr.

Firouz Gaini er útbúgvin antropologur (mannfrøðingur) av lærdu háskúlunum í Oslo og Keypmannahavn. Í løtuni arbeiðir hann við eini Ph.D-verkætlan á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya; evnið er ungdómsmentan í Havn.

## Skráin fyri fyrilestrarøðina er henda:

24. mars
Firouz Gaini: "Ernest Gellner. Størsti forsprákarin fyri rationalismuni í nýggjari tíð"
31. mars
Erika Hayfield: "Børn og forbrúk"
14. apríl
Hans Andrias Sølvará: "Vald, vitan og framburður í verkinum hjá Michel Foucault"
25. mai.
Jonathan Schwartz: "Max Weber kallar á teg! - Hví protestantiska siðalæran og sál kapitalismunnar (1904-5) eru klassikarar."

Allir fyrilestrarnir vera klokkan 20 í Ovastovu í Nóatúni.

VIÐMERKINGAR

# SEV fingið andlitslyft

**Klæmint Olsen**
*umboðsnevndarlimur*



Er SEV veruliga hamskift? Ella er talan um eitt andlitslyft? Svarið er tað seinna. Men kosmetiskar broytingar tryggja ikki framtíð SEV's.

Ymsar fráboðanir frá SEV í síðstu viku benda eisini á óbroyttan hugsanarhátt. Nýggju stjórarnir í SEV skulu setast innanhýsis. SEV tekur einsamlt avgerðir um alternativa orku. Nýggju ásetingarnar um atlit til náttúru og umhvørvi er tað, sum SEV altíð hevur gjørt.

Men endiliga eydnaðist tað. SEV er ikki longur ein afturlatin felagsskapur. Framyvir verða umboðsnevndarfundirnir almennir. Øll grund er at fegnast, tí Í mong ár hevur hetta verið eitt hjartamál.

Onkur onnur ábót er eisini, treyðugt so. Men hesar eru so langt frá nóg mikið til at tryggja felagsskapinum eina framtíð. Í onkrum føri er enntá talan um afturstig.

**Eingin verulig nýhugsan**
Umboðsnevndarformaðurin sigur, at ætlanin við broytingunum er at fáa størri opinleika og greiðari mannagongdir. Samstundis viðgongur hann, at ætlanin ikki hevur verið at broyta SEV grundleggjandi.

SEV hevur tann hugburð, at skal felagið nýmótansgerast, so skal tað koma uttanífrá. Tikið verður sum givið, at einkarrætturin er galdandi í allar ævir. Og einskiljing er eitt ljótt orð. Tí mugu og skulu landspolitikkararnir átaka sær sína ábyrgd.

Hóast talan bara var um andlitslyft, kundi nýhugsanin verið eitt sindur størri. T.d. tá ið tað snýr seg um stýrið, sum í dag hevur 7 stýrislimir, ið verða valdar úr 7 økjum í Føroyum - vanliga eru stýrislimirnir bý- og bygdarráðslimir. Hví ikki sleppa hesum fjasinum, minka talið av stýrislimum til 5 og velja fólk við veruligum førleika? Umboðs-nevndar--formaðurin ávaraði tó staðiliga ímóti broytingum á hesum øki.

**Starvsfólk SEV's**
Kommunurnar sleppa ikki longur at velja starvsfólk hjá SEV til lim í umboðsnevndina og stýrið. Hendan broyting er av tí góða, tí so koma tey ikki í ein dupultan leiklut. Umboða tey kommununa ella egin áhugamál?

Hinvegin hevur gongdin seinni árini verið, at starvsfólk í størri fyritøkum hava rætt til umboðan í leiðsluni, t.d. er hetta ásett í partafelagslógini. Starvsfólkini eru tá ikki í einum dupultum leikluti, men umboða bara seg sjálv sum starvsfólk.

Umboðsnevndin havnaði tó einum uppskoti um umboðan hjá starvsfólkunum í stýrinum. Tað er harmiligt, at umboðsnevndin er so afturhaldssinnað. Eg ivist ikki í, at kommunala eftirlitið krevur, at starvsfólkini verða umboðað so ella so.

**Stýrið ófrákoyriligt**
Størsti bummarin, sum umboðsnevndin gjørdi var tó at samtykkja eina áseting, sum í veruleikanum ger, at stýrið ikki kann koyrast frá.

Hetta var annars ikki ætlanin. Afturfyri at stýrið fekk størri vald á ymsum økjum, skuldi tað eisini sita eitt sindur leysari. Møguleiki skuldi verða fyri at koyra stýrið frá í úrtíð.

Stýrið sleppur nú at seta forstjóran - og nýggju deildarstjórarnar - og tað sleppur at ráða yvir bygnaði SEV's. Sagt varð, at eftir gomlu viðtøkunum var ivasamt, um stýrið kundi koyrast frá, og tí var ynski um at gera hetta greiðari.

Úrslitið gjørdist, at 1/3 av umboðsnevndarlimunum skulu skriva undir fyri yvirhøvur at fáa málið á skrá. Hetta er meira enn kravt verður fyri at kalla inn til eykaaðalfund. Heldur ikki umboðsnevndarformaðurin sjálvur ella stýrið kunnu krevja málið á skrá.

Øll við bara minsta kunnleika til, hvussu SEV-skipanin virkar, vita, at hetta í veruleikanum merkir, at stýrið ikki kann koyrast frá. Umboðsnevndin havnaði so dyggiliga einum uppskoti um at gera tað léttari at koyra stýrið frá. Umboðsnevndin frátók sær sjálvum møguleikan fyri veruligari ávirkan.

Skilji ikki, hvussu sakførari SEV's kundi leggja rygg til tílíkt krutl. Vónandi gjøgnumskoðar kommunala eftirlitið hetta avoldaða lógarsmíð.

**Nýggju stjórarnir**
SEV fær nú tríggjar nýggjar stjórar. Haldi sjálvur, at nóg mikið hevði verið at sligið fast við sjeytummaseymi, at stýrið avger bygnað SEV's. Tann grundleggjandi spurningurin er nevniliga, um stýrið hevur vilja og førleika at seta verandi stjóra uppá pláss. At tað koma tríggir nýggir deildarstjórar, ger hetta ikki léttari. Tvørturímóti. Nú verða fýra stjórar, sum kunnu draga stýrið upp á tráð. Og forstjórin er hin sami.

Umboðsnevndarformaðurin segði í útvarpinum, at nýggju stjórarnir verða settir innanhýsis. Hetta kann ikki vera rætt. Størvini mugu lýsast leys, so kunnu verandi deildarstjórar søkja á jøvnum føti við onnur. Starvssetanir uttan lýsing hava vit sæð alt ov nógv til í SEV. SEV er ein almenn fyritøka, og tað er upp á tíðina, at SEV lýkur minstakrøvini til starvssetanir innan tað almenna.

Og hvussu er tað nú við tí almenna innlitinum? Kanska okkara fjølmiðlafólk kunnu kanna, um SEV er fevnt av hesi lóg.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



# Minningarorð um Bergtóru Eidesgaard



Tann 1. mars andaðist Begga, bert 53 ára gomul. Begga var ættað úr Vági, dóttir Einu og Dánjal Jacob Mikkelsen. Hon var einasta genta í einum systkinaflokki uppá fýra. Begga var gift við Magna bróðir, tey eiga tveir synir René og Djóna.

Eg var smágenta, tá Magni og hon funnu saman, so alt tað eg kann minnast, hevur Begga verið ein partur av okkara familju. Tað sýnist so veruleikafjart, at tú ikki ert millum okkum longur.

Tá eg siti og hugsi um, hvussu eg best kann lýsa tín persón, er niðurstøðan heilt einføld, tú vart í roynd og veru framúrskarandi á so nógvum økjum.

Tað er ikki av tilvild, at eg fyrst nevni tykkara heim. Tú dugdi so ómetalig væl at fáa eitt hús til eitt hugnaligt heim, bæði tá ræður um innrætting og atmosferu. Serliga hugnaligt var um høgtíðirnar, prýtt við alskyns heimagjørdum prýðum, ja sjálvt í Havn sita nógvar nissur hvørji jól og hugna um hjá okkum, alt nissur, sum tú so evnaliga hevur gjørt.

Ávegis at vitja tykkum, plagdu mínar gentur at spyrja, um vit skuldu eta hjá tykkum. Tað elskaðu tær, og hvør gjørdi ikki tað? Tú kundi uppá onga tíð borðreiða við einari flottari máltíð, og altíð smakkaði líka væl. Serliga væl minnast vit hin summardagin, vit fóru niðan á Ryskivatn. Tú hevði, meðan ongin varnaðist, bakað pannukøkur, sum vit hitaðu á heimagjørdari grill í haganum.

Undantikið, tá synirnir vóru lítlir, hevur tú verið á arbeiðsmarknaðinum. Tú hevur í nógv ár arbeitt á Ellis- og Røktarheiminum á Tvøroyri. At tú vart góð við títt arbeiðspláss, vísti tú so týðiliga, tá tit savnaðu pening til ein buss. Í mánaðir brúkti tú hvørja fríløtu at binda, seyma o. a. Tað var eisini uppí fleiri posar av pløggum og lutum, tú gavst til hesi tiltøk.

Eg havi mangan undrast yvir, hvussu tú fekst tíð til alt tað, tú gjørdi. Hvørja summarferiu, ja mangan heilt út í august og september, vart tú álitið í bønum, tú arbeiddi sum ein hestur og man hava fingið nógvar byrður av hoyggi til høldar.

Seinasta summar var tú farin undir at høgga og laga grót oman fyri húsini hjá tykkum við Kráir. Ikki júst nakað fittligt arbeiði fyri eitt konufólk, men tú vart so røsk, eitt konubrot.

Altíð vart tú klár við eini hjálpandi hond, um tað so var at koma norður um fjørð at matgera, tapeta, mála, leggja gólv á, ja tú kundi hjálpa við øllum, tí tú dugdi alt. Tú hevur mangan rætt mær tína hjálpandi hond, tað var ongantíð ein spurningur, um tú hevði tíð.

Sum prestur so gott segði til tína jarðaferð, so ræður ikki bert um at liva leingi, men eisini um at liva eitt lív við innihaldi, og Begga tað gjørdi tú, hjálpsom og virkin, sum tú vart, sjálvt um eg so inniliga hevði ynskt, at tú fekst fleiri ár. Vit, sum hava kent teg, hava øll okkurt gott at minnast aftur á. Og ikki minst tit tríggir Magni, René og Djóni. Tit tríggir komu fram um alt annað hjá Beggu. Sjálvt tá sjúkan hevði gjørt so mikið um seg, at tú visti hvønn veg tað bar, var tað ikki teg sjálva, tú hugsaði um og tók synd í, men um hvussu maðurin og synirnir fóru at klára tað, at tú ikki var hjá teimum við tínum kærleika og umsorgan.

Har er tómligt hjá tykkum nú við Kráir, men vónandi fara tit, sum frá líður, at ugga tykkum við øllum teimum góðu minnunum, tit hava um konu og mammu tykkara.

Begga, tú hevur enn einaferð prógvað, at tað ræður um at njóta hvønn dag. Vit vita ikki, hvussu nógvar vit hava eftir. Í august vóru vit øll saman í veitslulag, tá sonur tykkara René og Kirstin hildu brúdleyp. Tín partur lá, sum altíð, ikki eftir í allari stákanini, og í dag eitt hálvt ár seinni ert tú, aftaná eina ræðuliga sjúkralegu, farin, ótrúligt.

Við hesum orðum lýsi eg frið yvir minni um teg góða Begga.

**Eyðdis**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara góða mamma, vermamma, omma, langomma og olduromma

**Hanna Johannesen**
vanliga nevnd Boys Hanna
í Miðvági

andaðist á landssjúkrahúsinum
leygardagin 20. mars, 95 ára gomul.

Kistan fer av landssjúkrahúskapellinum
mikudagin 24. mars kl. 18.00 til Ellisheimið í Miðvági.
Jarðarferðin verður úr Miðvágs kirkju
leygardagin 27. mars kl. 1400

**Børnini**

Tey, ið vilja minnast Honnu, kunnu lata eina peningagávu til frama fyri útferðir o.a. hjá búfólkunum á Ellisheiminum í Miðvági. Konto í peningastovnunum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara góði pápi, abbi, langabbi og verfaðir

**Óli Olsen**
Leirvík

andaðist á Landssjúkrahúsinum
leygardagin 23. mars, 82 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Leirvíkar kirkju
týsdagin kl. 14.00

*Familjunnar vegna*
**Óli, Bina, Oddvør og Rannvá**

Tey, ið vilja minnast Óla, kunnu lata Leirvíkar kirkju eina gávu, konto í peningastovnunum.

P/F Hansen, Strendur:

# Framsýning av campingvognum í SMS

**Í seinastu viku hevði P/F Hansen á Strondum framsýning av týsku Hobby campingvognunum á Torginum í SMS. Campingvognar eru vorðnir meira áhugaverdir, nú tollurin er tikin av**



*Kári Hansen frá P/F Hansen í ferð við at fáa tann stóra Hobby 650 KMFe út úr SMS. Fyri at fáa vognin inn og út gjøgnum hurðarnar, varð neyðugt at taka bæði hjól og akslar undan*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Fyri okkum føroyingar kann hetta blíva ein nýggjur máti at ferðast upp á, sigur Kári Hansen frá P/F Hansen á Strondum, sum fekk umboð upp á týsku Hobby campingvognarnar í fjør.

Áhugin var sera stórur fyri vognunum, sum stóðu á Torginum í SMS í nakrar dagar. Nógv fólk høvdu ongantíð sæð inn í ein campingvogn áður, og blivu tey heilt ovfarin av at síggja, hvussu hugnaligir og væl innrættaðir teir eru.

Campingvognar hava í nógv ár verið so hart tollaðir Føroyum, at tað hevur als ikki verið áhugavert at ogna sær ein slíkan.

Teir føroyingar sum keyptu sær ein campingvogn uttanlands, tóku hann ikki heim við, tí at tollurin var so høgum í Føroyum.

Men hetta er nú broytt soleiðis, at bert MVG skal gjaldast av campingvognum. Hobby campingvognarnir frá P/F Hansen kosta frá umleið 100.000 krónum og upp eftir.

Ein stórur Hobby 650 KMFe til 4 vaksin og 2 børn kostar umleið 160.000 krónur, hetta er bert helvtarprísur av, hvat teir kostaðu, áðrenn tollurin bleiv tikin av.

Hobby campingvognar verða gjørdir í 70 ymiskum variantum.

Kári Hansen sigur, at hann hevur eisini ætlanir um at leiga campingvognar út til bæði føroyingar og útlendingar, sum koma higar at vitja. P/F Hansen umboðar eisini Brenderup viðfestisvognarnar.

## Dagurin

**23. mars. Fidelis**. Sigst at vera halgimenni, sum varð tikið av døgum í Afriku í 5. øld, men annars vita teir einki um hann. Fidelis merkir *tann trúfasti.*

*Rasmus Effersøe doyði hendan dagin í 1916.*